YRKIS depilin

Læra fyri lívið

## Mannagongd tá søkt verður um læruplássgóðkenning

Hevur fyritøkan, stovnurin ella virkið, ikki havt lærlingar áður, skal søkjast um læruplássgóðkenning til tað yrkisgrein fyritøkan umboðar. Um tað eru gingin 5 ár síðan seinasta læruplássgóðkenning var játtað, skal henda endurnýggjast við nýggjari umsókn.

Ein læruplássgóðkenning kann útvegast til eitt ávíst yrki. Er ynski um at gerast góðkent lærupláss til fleiri ymisk yrkir, skal umsókn sendast fyri hvørt einstakt yrki.

Tað sama er galdandi fyri læruplássgóðkenning til deildir aðrastaðnis, er neyðugt at senda umsókn fyri hvørt einstaka stað.

Fyri at fáa játtað læruplássgóðkenning, skulu treytirnar lúkast, ið eru ásettar í galdandi kunngerð og reglugerð um yrkisútbúgvingar.

Tað er ymisk frá útbúgving til útbúgving, hvørjar treytirnar eru. Hesar treytir eru nærri lýstar í upplýsingarblaðnum ella oyðiblaðið um einstøku útbúgvingarnar. Tó eru nakrar av treytunum tær somu. Mest avgerandi er, at fyritøkan kann útvega lærlingi tær arbeiðsuppgávur, sum hoyra til viðkomandi yrkisgrein, og fremur hesar uppgávur javnan.

Umframt hetta, skal fyritøkan hava yrkislærd starvsfólk í føstum starvi til at taka sær av lærlingi í lærutíðini. Hesi starvsfólk skulu hava samsvarandi útbúgving og minst 3 ára arbeiðsroyndir.

Snýr umsóknin seg um góðkenning til eina skrivstovu-, sølu- ella handilsliga útbúgving, kunnu starvsfólk við 10 ára arbeiðsroyndum verða ábygdari av lærlingum.

Tað er bert gjørligt at taka ein lærling fyri hvønn yrkislærdan ábyrgdara av lærlingum. Ábyrgdarin skal verða á staðnum har lærlingurin verður settur í læru. Um so er, at bert ein ábrygdari er til staðar, kann næsti lærlingur í fyrsta lagi koma í læru, tá fyrsti setti lærlingur er komin hálvvegis við síni útbúgving.

Umframt nevndur treytir, skal fyritøkan eisini lúka treytir um trygt arbeiðsumhvørvi, ásettar í lógum og reglum.

**Soleiðis verður umsóknin viðgjørd og góðkend**.

**1**. Fyll út skjalið um læruplássgóðkenning innan valda yrki.

**2.** Skrásetingarskjal sambært vinnuskránni skal fylgja við umsóknini.

**3.** Sveinabræv, lærubræv ella viðkomandi útbúgvingaskjøl hjá ábyrgdrafólki av lærlingi, skal sendast við umsóknini.

**4.** Hevur fyritøkan fleiri deildir ymsastaðni ella á ymsum matrikklum, er neyðugt at senda umsókn fyri hvørt einstakt stað.

**5.** Send umsóknina til Yrkisdepilin

Tá Yrkisdepilin hevur móttikið umsóknina, tekur Yrkisnevndin støðu til um fyritøkan, virki ella stovnurin líkur treytirnar til at gerast lærupláss.

Yrkisdepilin vendir aftur við avgerðini hjá Yrkisnevndini innan 4 vikur eru farnar frá umsóknin er móttikin.

Læruplássgóðkenning verður latin fyri eitt 5 ára skeið. Eftir hetta, skal nýggj umsókn sendast Yrkisdeplinum til góðkenningar.

Eru ivamál ella spurningur, hjálpa vit hjálpa fegin.